# Sølustjóri til Vodafone FO

## Vodafone FO søkir eftir sølustjóra.

Vodafone FO hevur høvuðssæti í Tórshavn, Føroyum. Sølustjórin verður ein av mest týðandi limunum í leiðslu felagsins, og hann kemur eisini at virka sum varastjóri.

### Starvslýsing:

Sum sølustjóri fært tú ábyrgdina av trimum høvuðsøkjum: beinleiðis sølu, kundarøkt og vinnuligari sølu. Hvørt øki hevur sín egna leiðara, sum virkar undir tær. Eisini fært tú ábyrgdina av roknskapinum fyri hesi øki. Søludeildin hevur alstóran týdning fyri kappingarstøðu felagsins á marknaðinum. Tú skalt tí megna at geva íkast til virkisætlanina hjá Vodafone FO við at taka stig til og seta í verk ætlanir fyri sølu og marknaðarføring, og at seta ítøkilig mál fyri virksemið. Sum varastjóri hevur tú harafturat leiðsluna av fyritøkuni, tá ið stjórin er burturstaddur.

### Starvskrøv:

- Hollar royndir í at gera og fremja ætlanir innan sølu og marknaðarføring á marknaðum í Norðurlondum, bæði til privatkundar og vinnuligar kundar
- Leiðsluroyndir innan sølu, grundað á marknaðargreiningar, greiðar virkisskráir og brúk av sølufremjandi skipanum
- Í minsta lagi 5 ára royndir við starvsfólkaleiðslu innan marknaðarføring
- Søluroyndir bæði í beinleiðis sølu og gjøgnum fjølmiðlar
- Royndir í at selja og veita tænastu innan hátøknivørur
- Gott skil fyri KPI-skipanum (Key Performance Indicators)

Tú skalt hava sera góðan hug til starvið og hava eina avrikaskrá, við góðum úrslitum innan sølu og marknaðarføring.

### Vit bjóða:

- Eitt óformelt og virkið arbeiðsumhvørvi
- Eitt lyklastarv í eini fyritøku, sum byggir á sunn virði
- Eitt spennandi starv við góðum møguleikum fyri persónligari menning

### Meira kunning:

Hevur tú spurningar um starvið, ring vinaliga ella skriva til Bjarna Askam Bjarnason, stjóra, á antin +298 502085 ella til t-post bab@vodafone.fo

Umsóknir skulu sendast við t-posti til bab@vodafone.fo

Seinasta freist at søkja er 24. juni kl. 12.00.

Vodafone FO veitir eitt breitt úrval at tænastum innan telesamskifti til stakkundar, vinnu og feløg fyri kappingarførar prísir. Vodafone FO hevur ment eina sterka fjarskiftisskipan í Føroyum og hevur í løtuni 35 fólk í starvi. Vodafone FO samstarvar við Vodafone Group, heimsins leiðandi altjóða samskipan innan fartelefonsamskifti, og er ført fyri at veita tænastur um allan heim. Vodafone FO er dótturfelag hjá Vodafone Iceland. Vodafone FO hevði ein umsetning í 2008 upp á DKK 100 mió.




vodafone




# MASKINMEISTARI TIL NORRÖNU

## Vilt tú verða í fyrstu røð í føroyskari skipa- og ferðavinnu?

Smyril Line søkir eftir maskinmeistara til Norrönu. Vit bjóða honum/henni eitt spennandi starv umborð á flaggskipinum í føroysku ferðavinnuni. Starvið er avbjóðandi og fjølbroytt, og tú fært ein góðan møguleika at verða við í framhaldandi menningini av Norrönu og Smyril Line – og harvið føroysku ferðavinnuni.

Títt komandi arbeiðspláss er eitt av størstu, bestu og nýggjastu skipum á Norðuratlantshavinum, og samstundis størsta skip føroyingar eiga. Hon tekur 1482 ferða fólk, 800 bilar og manningin, tá hon er mest, telur heili 118 fólk. Aftrat góðum starvstreytum bjóða vit hartil eina áhugaverda siglingarætlan, góða løn og góða frítíðaravtalu.

**Førleikakrøv til maskinmeistara**

- Fulla maskinmeistara útbúgving við í minsta lagi STCW áteknaðum vinnubrævi sum skipsmaskinmeistari av 1. stigi
- Heilsu-, sløkkileiðara-, roykkavara- og trygdarprógv.
- Arbeiða sjálvstøðugt og góð samstarvsevni.

**Setanartreytir**

Sambært sáttmála millum Maskinmeistarafelagið og Reiðarafelagið.

Vit hugsa okkum, at tú hevur roynd frá størri skipum, men hetta er eingin treyt.

**Umsóknir**

Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu sendast til:

**controller@norrona.fo**

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til maskinstjóran á:

**+298 34 48 46 ella chief.engineer@norrona.fo**

Umsøknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 1. juli 2009.

Smyril Line varð stovnað í 1982, og er í dag ein altjóða fyritøka við skrivstovum í Føroyum, Íslandi, Týsklandi og Danmark. Umframt egnar skrivstovur, hevur felagið eisini samstarvsfelagar í meginpartinum av evropeiska meginlandinum og restini av útheiminum.

SMYRIL LINE · YVIRI VIÐ STROND 1 · POSTBOKS 370 · FO-110 TÓRSHAVN · TLF 34 59 00 · FAX 34 59 50 · OFFICE@SMYRIL-LINE.FO

WWW.SMYRIL-LINE.FO